Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2024

Staravegur 17, Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34

Stangaskákið 1, Postboks 346
FO-710 Klaksvík
Telefon 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Sp/f 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Leiðslufrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	8
Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara	9
Nýttar roknskaparreglur	12
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember	16
Fíggjarstøða 31. desember	17
Notur	19

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Teldupostur: bg@bg.fo

Roknskaparár nr. 20

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Símun Gullaksen, formaður
bóndi

Barbara P. Vang, næstforkvinna
løgfrøðingur

Birita Mortansdóttir
búskaparfrøðingur

Rani Slættanes
sølu- og innkeypsleiðari

Niels Winther Poulsen
løgfrøðingur

Varalimir:

Eynar Martin Kjærbo
bóndi

Hildigunn Ellingsgaard
løgfrøðingur

Malan Óladóttir á Dunga
búskaparfrøðingur

Dánial Christoffersen
figgjarleiðari

Christian Danielsen
búskaparfrøðingur

Stjórn

Egon Joensen, stjóri

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar og ognarrøktarar

Føroya Banki
Betri Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
PP Capital
Ringkjøbing Landbobank

Leiðslufrágreiðing

Virksemi

Sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20. november 2020, er endamál Búnaðargrunsins at veita fígging til menning av føroyskum landbúnaði og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina, ið er partur av virkseminum hjá Búnaðarstovuni.

Seinna endamálið er gjald fyri útreiðslur á fíggjarlógini, sum Løgtingið játtar á høvuðskontu 6.33.2.03 og fíggjar við at krevja pening úr Búnaðargrunninum, sum verður bókaður sum inntøka á høvuðskontu 20.52.1.30 í løgtingsfíggjarlógini.

Við til virksemi hjá Búnaðargrunninum hoyrir umsiting av festikontum, felags festipulju og kontum fyri mist bit. Áður hevur Búnaðargrunnurin eisini staðið fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum, men frá og við 2021 hevur Búnaðarstovan yvirtikið hesa innkrevjing.

Rakstur og fíggjarstøða

Samlaðu rakstrarinntøkurnar í 2024 vóru 6.103 tkr. í mun til 5.509 tkr. í 2023. Talan er um eina inntøkuhækking á umleið 600 tkr., ið serliga stavar frá størri rentuinntøkum, men partvís eisini frá meirinntøku í sambandi við sakarmálsgjøld og leigu.

Fyri 2024 vóru rakstrarútreiðslurnar hjá grunninum 4.711 tkr. – Samanborið við 2023, tá upphæddin var 4.873 tkr., eru rakstrarútreiðslurnar lækkaðar við 161 tkr., ið svarar til eina lækking á 3,3%.

Úrslitið av grundrakstrinum í 2024 varð sostatt eitt avlop á 1.392 tkr., ið var meir enn tvífalt so nógv sum í 2023, tá hetta úrslitið var 637 tkr.

Rokningin frá landskassanum til rakstur av jarðarumsitingini var 6.300 tkr., ið er 2.000 tkr. hægri enn í 2023, tá rokningin var 4.300 tkr. Hetta er játtan, ið umvegis løgtingsfíggjarlógina verður latin til tann partin av virkseminum hjá Búnaðarstovuni, ið tekur sær av at umsita landsjørðina.

Íroknað gjaldið til landskassans rakstur er úrslitið áðrenn avsetingar eitt hall á 4.908 tkr. fyri 2024 og eitt hall á 3.663 tkr. fyri 2023.

Eftir avsetingar á 300 tkr. í 2024 og 150 tkr. í 2023 gjørdist úrslitið áðrenn fíggjarpostar eitt hall á 5.308 tkr. í 2024 samanborið við eitt hall á 3.814 tkr. í 2023.

2024 hepnaðist eins og 2023 sera væl viðvíkjandi fíggjarligum inntøkum av virðisbrøvum og innistandandi peningi. Netto gjørdist talan um eina inntøku í 2024 á 11.639 tkr., ið var 689 tkr. meir enn fyri 2023, tá upphæddin var 10.950 tkr.

Við úrslitinum av fíggjarpostum gjørdist ársúrslitið fyri 2024 eitt avlop á 6.431 tkr. í mun til eitt avlop á 7.136 tkr. í 2023.

Leiðslufrágreiðing

Endaliga úrslitið fyri 2024 gjørdist sostatt 705 tkr. minni enn árið frammanundan. Orsøkin er serliga, at rokningin fyri útreiðslur hjá landskassanum hækkaði við 2 mió.kr. Uttan hesa hækking hevði endaliga úrslitið verið 1,3 mió.kr. betri enn árið fyri.

Saldan fyri útlán og niðurskriving til tap er í árinum økt við umleið 0,8 mió.kr. og táttar við ársenda í 134 mió.kr. – Í 2024 vórðu annars virkjaði lán fyri til samans 25 mió.kr. og hevur upphæddin á afturgoldnum lánum tí táttað í tað sama.

Fíggjarjavnin við árslok er 348,4 mió.kr., samanborið við 350,3 mió.kr. árið fyri.

Eginognin vaks úr 336,9 mió.kr. til 340,6 mió.kr. og svaraði við árslok 2024 til 97,8% av fíggjarjavnanum.

Broytingar í eginogn
Høvuðsgrunnurin er í árinum vaksin úr 84,2 mió.kr. til 90,65 mió.kr., og stavar henda broyting beinleiðis frá rakstraravlopinum í 2024 á 6,4 mió.kr.

Saldan á festikontunum er 189 mió.kr., ið er ein góð millión minni enn árið fyri. Lítla broytingin kann tykjast sum at lítið hendir á festikontunum, men hóast hetta eru stórar flytingar bæði inn og út av festikontunum.

Fyri sølu av almennari jørð vórðu 4,3 mió.kr. bókaðar inn á festikonturnar. Harumframt komu slakar 700 tkr. í inntøku frá grótbrotum og ein lítil millión frá leiguinntøkum. Hinvegin vórðu 5,6 mió.kr. fluttar til felags festipuljuna og 1,7 mió.kr. goldnar út í stuðli.

Felags festipuljan er í árinum minkað við 1,3 mió. kr., úr 49,7 mió.kr. til 48,4 mió.kr.

Hóast lítla broyting í salduni eru eisini stórar flytingar farnar fram í felags festipuljuni. Umleið 5,6 mió.kr. eru fluttar frá festikontunum til felags puljuna, meðan næstan 7 mió.kr. eru goldnar úr puljuni sum stuðul. Leggjast kann afturat, at fyri seinastu 5 árini tátta útgjøldini úr felags festipuljuni næstan í 50 mió.kr., og at tað framvegis eru verkætlanir í gongd, sum koma at hava stór útgjøld við sær.

Við árslok var samlaða saldan á kontum fyri mist bit 12,5 mió.kr., ið er ein lækking á 121 tkr. í mun til árið frammanundan. Í 2024 vórðu 250 tkr. goldnar inn, meðan 371 tkr. vórðu goldnar út.

Virðisbrøv
Rentur og kursjavningar av virðisbrøvum góvu í 2024 eitt avlop á góðar 11,6 mió.kr., ið var umleið 0,7 mió.kr. meir enn í 2023, tá avlopið var slakar 11 mió. kr.

Samanlagt fyri 2023 og 2024 hevur avlopið av rentum og kursjavningum verið 22,6 mió.kr., og harvið er óvanliga stóra hallið í 2022 á 20,2 mió.kr. nú gott og væl vunnið innaftur.

Verður hugt at myndunum á næstu síðu kann sigast, at hóast sera vánaligu gongdina í 2022 hevur tað kortini loyst seg hjá grunninum at seta tøka gjaldførið í virðisbrøv.

Leiðslufrágreiðing

Myndirnar vísa gongdina avkasti á virðisbrøvum, frá tí at grunnurin í 2001 byrjaði at gera íløgur í virðisbrøv og fram til árslok 2024.

Fyrra myndin vísir árliga avkastið frá 2001 til 2024 fyri virðisbrævarøktina hjá grunninum saman við einum samanberingaravkasti (EFFAS 1-5) og rentuni á innlánum. Uttast til høgru síggjast stabbarnir fyri einstøku miðalavkastini í hesum tíðarskeiði. Fyri virðisbrøvini hevur avkastið í miðal verið 2,49%, meðan samanberingaravkastið í miðal hevur verið 1,91%. Miðalrentan á innlánum hevur í hesum tíðarskeiði verið 1,55%.

Alt eftir íløguhátti vísir seinna myndin eina samanbering av, hvussu virðið á 100 krónum hevur broytt seg síðani ár 2000. Fyri tíðarskeiðið frá 2000 til 2024 hava 100 krónur í virðisbrøvum samanlagt givið eitt avkast á 78,07 kr., EFFAS 1-5 hevur givið 56,02 kr., og innlánsrentan hevur givið 44,20 kr.



Leiðslufrágreiðing



Framtíðarútlit
Í mai mánaða 2025 samtykti Løgtingið fleiri lógarbroytingar, ið væntandi koma at hava neiliga ávirkan á fíggjarligu gongdina hjá Búnaðargrunnium. Í hoyringarsvarum til lógaruppskotini varð greitt frá, hvørjar avleiðingar hesar broytingar koma at hava á raksturin av grunninum, herundir versnandi útlitum fyri, at grunnurin kann hava ein langtíðarhaldføran rakstur.

Víst varð m.a. á, at grundraksturin hjá Búnaðargrunnurin ikki megnar at gjalda alsamt vaksandi rokningarnar til fígging av játtanum hjá Løgtinginum og at neyðugt er, at fæið í grunninum kann vaksa í takt við prís- og lønarvøksturin í samfelagnum.

Seinastu árini hevur fíggjarliga styrkin hjá Búnaðargrunninum ikki megnað at fylgt búskaparligu gongdini í samfelagnum, og við stórari vissu verða umstøðurnar til hetta ikki betri við samtyktu lógarbroytingunum. Væntandi verður avleiðingin av hesum, at grunnurin lutfalsliga viknar sum fíggingarstovnur og við tíðini fær minni og minni týdning sum viðleikari, tá nýggjar íløgur skulu gerast í landbúnaðarvinnuni.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri Búnaðargrunnin fyri 2024.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok 2024.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 7. mai 2025

Stjórn:

Egon Joensen

Stýrið:

Símun Gullaksen
formaður

Barbara P. Vang
næstforkvinna

Birita Mortansdóttir

Rani Slættanes

Niels Winther Poulsen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin 7. mai 2025

Fundarstjóri:

Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum

Grannskoðanarátekning á ársroknskapin

Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2024 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginpeningsuppgerð og notum, íroknað nýttan roknskaparhátt.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í tráð við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við givna játtan og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av stovninum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt stovnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskapar-ásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur aðrar ætlanir við stovninum.

Grannskoðanartekning frá óheftum grannskoðara

Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðaraátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparabrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera roknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt stovnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanar-átekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðaraátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til broytingar í hesum viðurskiftum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Grannskoðanartekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða, og samskifta um týðandi eygleiðingar, so sum møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit koma fram á í sambandi við grannskoðanina.

Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Grundað á gjørda arbeiðið, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 7. mai 2025
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin fyri 2024 er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.", tó soleiðis, at niðurskrivingar móti væntaðum tapum upp á útlán eru viðgjørdar samsvarandi reglunum fyri peningastovnar.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár. Tó er bólkingin av fíggjarligum inntøkum og útreiðslum viðvíkjandi virðisbrøvum víst fyri seg í rakstrinum fyri 2024 og 2023. Hetta er ein broyting í mun til undanfarin ár, tá inntøkur frá fíggjarpostum vórðu bólkaðar saman við rentuinntøkum frá útlánum vm. Umbólkingin av fíggjarligum inntøkur hevur ikki havt ávirkan á úrslit grunsins fyri 2023 ella 2024. Samanberingartølini eru tillagað samsvarandi broytingini.

Um innrokning og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Roknskaparligar metingar

Virðisásetingin av útlánum grunsins er tengd at metingum hjá leiðsluni um hvørja ávirkan framtíðar hendingar kunnu hava á virðið á útlánum.

Metingarnar hjá leiðsluni eru gjørdar við støði í teimum royndum, sum leiðslan hevur við lánsveiting til ymsar bólkar av lántakarum umframt fyritreytum, sum leiðslan eftir umstøðunum metir verða ráðiligar, men sum eru óvissar og torførar at siga nakað um.

Um fyritreytirnar, sum metingarnar byggja á, broytast ella um grunnurin fær nýggja vitan um ávís øki, kann tað fáa ávirkan á uppgerðina av roknskaparliga virðinum.

Rakstrarroknskapur

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Nýttar roknskaparreglur

Samsvarandi lógini um grunnin verður á hvørjum ári rindað ein upphædd til Búnaðarstovuna, svarandi til kostnaðin av at reka jarðarumsitingina.

Niðurskriving til tap uppá útlán og staðfest tap

Upphæddin fevnir um broytingar í niðurskriving til tap uppá útlán umframt staðfest tap.

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um skatt at gjalda og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluført í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán verða virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskrivingar verða gjørdar ímóti væntaðum tapum, tá ið tað fyriliggja óvildugar ábendingar um, at eitt útlán ella ein bólkur av útlánum eru lækkað í virði.

Eru óvildugar ábendingar um at eitt einstakt útlán er lækkað í virði, verður lánið niðurskrivað.

Fyri útlán, har tað ikki finnast óvildugar ábendingar um virðislækking fyri hvørt útlán sær, verður mett um niðurskrivingartørvin fyri samlaða bólkin og niðurskrivingartestir verða gjørdar við støði í væntaðum peningastreymum framyvir og við støði í staðfestum tapsroyndum fyri einstaka bólkin. Bólkingin av útlánum tekur fyrst og fremst støði í vinnugrein og lániváða.

Óvildugar ábendingar um virðislækkingar kunnu m.a. vera eftirstøða, versnandi rakstrarúrslit. minkandi tilfeingi og/ella niðurgongd innan ávísar vinnugreinar.

Niðurskrivingarnar verða gjørdar upp sum munurin ímillum tað roknskaparliga virðið á útlánunum og nútíðarvirði av forvæntaðum peningastreymum, herímillum realisatiónsvirðið

Nýttar roknskaparreglur

av møguligum trygdarveitingum. Sum diskonteringsatsur verður tann effektiva rentan, sum er ásett fyri roknskapartíðarskeiðið, nýtt til útrokning av nútíðarvirðinum.

Niðurskriving til tap verður bókað á eina "korrektiv" konto, sum verður mótroknað útlánunum. Broytingar í "korrektiv" konto verða innroknaðar í rakstrinum undir "Niðurskriving uppá útlán og staðfest tap". Vísir tað seg seinni. at virðislækkingin ikki er varandi, verður niðurskrivingin afturført yvir somu konto.

Verður staðfest, at eitt lán ikki kann afturgjaldast, verður lánið endaliga avskrivað yvir "korrektiv" konto.

Útlán eru víst sum fíggjarlig støðisogn í fíggjarstøðuni.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi

Virðisbrøv

Virðisbrøv, sum eru partur av virðisbrævagoymsluni hjá grunninum, verða innroknað til dagsvirði á handilsdegnum sum fíggjarlig støðisogn og síðan virðisásett til dagsvirði. Broytingarnar í dagsvirðinum verða tiknar við so hvørt í rakstrinum sum "rentuinntøkur vm".

Virðisbrævainntøkur verða vístar sum ein serstakur postur í notunum.

Virðisbrøv eru vístar sum fíggjarlig støðisogn í fíggjarstøðuni.

Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir.

Eginogn

Eginogn grunsins er býtt upp í høvuðsgrunn, festikontur, felags festipulju, kontur fyri mist bit og kolagrevstrargrunn.

Høvuðsgrunnurin er settur saman av árliga rakstrarúrsliti grunsins.

Festikontur eru settar saman av inn- og útgjøldum, umframt flytingum sum eru gjørdar til Felagsfestipulju sambært lóg fyri grunnin.

Felagsfestipulja er settar saman av útgjøldum, umframt flytingum sum eru gjørdar frá Festikonto sambært lóg fyri grunnin.

Kontur fyri mist bit eru settar saman av inn- og útgjøldum.

Nýttar roknskaparreglur

Kolagrevstrargrunnur er settur saman av inn- og útgjøldum.

Inn- og útgjøld av festikontum, felags festipulju og kolagrevstrargrunninum verða innroknað beinleiðis undir nevndu kontur, sum eru bólkaðar undir eginogn grunsins.

Skyldugur skattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Útsett skattaáogn, íroknað skattliga virðið av framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður uppgjørd til tað virði, sum áognin verður mett at kunna realiserast til, antin við javnaði av skatting av framtíðar vinningi ella við mótrokning av útsettum skattaskyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Í teimum førum at skattliga virðið kann gerast upp eftir ymsum skattareglum, verður útsettur skattur virðisásettur við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist gjalding av skylduni.

Broytingar í útsettum skatti, sum standast av broytingum í skattasatsi, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin. Nýtti skattasatsurin í hesum ári er 18%

Skuld

Skuld verður upptikin til áljóðandi virði.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember

	Nota	2024	2023
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	100.521	33.000
Rentuinntøkur frá útlánum	2	5.687.076	5.273.117
Sakarmálsgjøld		315.154	203.252
Inntøkur til samans		6.102.751	5.509.369
Umsiting	3	-796.023	-1.076.966
Húsarakstur	4	-119.204	-191.684
Starvsfólkaútreiðslur	5	-3.795.985	-3.603.793
Búnaðarstovan		-6.300.000	-4.300.000
Úrslit áðrenn avsetingar og fíggjarpostar		-4.908.461	-3.663.074
Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap	6	-300.000	-150.540
Úrslit áðrenn fíggjarpostar		-5.208.461	-3.813.614
Fíggjarligar inntøkur	7	11.846.519	11.135.372
Fíggjarligar útreiðslur		-207.361	-185.617
Úrslit áðrenn skatt		6.430.697	7.136.141
Skattur av ársúrslitinum		0	0
Ársúrslit		6.430.697	7.136.141

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2024	2023
		kr.	kr.
OGN			
Fíggjarlig støðisogn			
Útlán	8	133.870.669	133.090.651
Virðisbrøv		203.954.377	206.631.761
		337.825.046	339.722.412
Áogn			
Onnur áogn	9	972.254	1.331.539
		972.254	1.331.539
Tøkur peningur	10	9.575.232	9.228.250
Ogn í umferð til samans		10.547.486	10.559.789
OGN TIL SAMANS		348.372.532	350.282.201

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2024	2023
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginogn			
Høvuðsgrunnurin	11	90.650.326	84.219.629
Festikontur	12	189.046.323	190.365.313
Felags festipulja	13	48.391.713	49.705.020
Kontur fyri mist bit	14	12.476.417	12.598.020
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginogn til samans		340.581.582	336.904.785
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Kreditorskuld		356.732	243.239
Onnur skuld	15	7.434.218	13.134.177
Skuld til samans		7.790.950	13.377.416
SKYLDUR TIL SAMANS		348.372.532	350.282.201
Veðsetingar og trygdarveitingar	16		
Eventualognir	17		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2024	2023
	kr.	kr.
Festileiga	49.521	0
Festigjøld við skifti	51.000	33.000
	100.521	33.000

2 Rentuinntøkur av útlánum v.m.

Rentur av útlánum	5.366.695	5.087.959
Rentur av eftirstøðum	320.381	185.158
	5.687.076	5.273.117

3 Umsiting

Løgfrøðilig og serkøn hjálp	136.783	136.010
Postgjald	2.266	6.130
Grannskoðan	56.000	54.500
Roknskaparhjálp v.m.	42.000	40.900
Vistir	27.434	34.126
Tinglesing	-121.900	156.560
Ymiskt	35.854	17.254
Námsferðir, skeið og eftirútbúgving	36.473	34.263
Stuðul	0	18.750
Tryggingar	66.603	66.598
Edv-útreiðslur	381.632	357.161
Smáinnbúgv	21.017	48.185
Telefon	19.255	25.100
Internet	21.540	21.540
Haldaragjald, bløð o.a.	30.657	24.157
Aðrar skrivstovuútreiðslur	40.409	35.732
	796.023	1.076.966

Notur

4 Húsarakstur

	2024	2023
	kr.	kr.
Viðlíkahald	0	52.495
Reingerð o.a.	42.626	42.338
Ljós og hiti	47.551	48.330
Urtagarðurin	13.572	32.532
Flagging v.m.	12.180	11.760
Ávaringarskipan	3.275	4.229
	119.204	191.684

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	2.796.200	2.649.403
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	98.746	87.900
Arbeiðsloysistrygging	26.923	29.282
Barsilsskipanin	31.580	28.111
Eftirlønargjald	444.437	407.049
Lønir og lønargjøld til samans	3.397.886	3.201.745
Samsýning, Stýrið	390.000	390.000
Ferðapeningur	8.099	12.048
	3.795.985	3.603.793

6 Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap

Staðfest tap í árinum	0	-105.540
Broyting í niðurskrivingum upp á verandi lán	-300.000	-45.000
	-300.000	-150.540

7 Fíggjarligar inntøkur

Rentur og kursjavningar av virðisbrøvum	11.843.520	11.133.651
Rentur av innistandandi peningi o.a.	2.999	1.721
	11.846.519	11.135.372

Notur

8 Útlán og niðurskriving til tap

	2024	2023
	kr.	kr.
Útlán	156.478.067	155.398.049
Niðurskriving til tap	-22.607.398	-22.307.398
	133.870.669	133.090.651

9 Onnur áogn

Mvg-áogn	569.610	1.096.456
Áogn Búnaðarstovan, søla av jørð	385.523	280.303
Onnur áogn	17.121	-45.220
	972.254	1.331.539

10 Tøkur peningur

Kassapeningur	150	150
Føroya Banki	5.499.092	2.282.384
Betri Banki	2.921.160	1.146.308
Suðuroyar Sparikassi	146.975	146.251
Norðoya Sparikassi	769.573	739.458
PP Capital (Jyske Bank)	90.057	65.834
Ringkjøbing Landbobank	148.225	4.847.865
	9.575.232	9.228.250

11 Høvuðsgrunnurin

Salda 1. januar	84.219.629	77.083.488
Rakstraravlop	6.430.697	7.136.141
	90.650.326	84.219.629

12 Festikontur

Salda 1. januar	190.365.313	190.388.797
Søla av jørð	4.274.580	8.396.663
Inntøka av grótbrotum	676.030	969.479
Flutt til felags festipulju	-5.570.033	-5.870.155
Eykajáttanir ísv Búnaðarstovuna	0	-2.700.000
Leiga	890.893	773.531
Alistøðir	105.850	129.864
	190.742.633	192.088.179
Nettoútgjøld	-1.696.310	-1.722.866
Festikontur 31. desember	189.046.323	190.365.313

Notur

13 Felags festipulja

	2024	2023
	kr.	kr.
Salda 1. januar	49.705.020	48.303.375
Flutt av festikontum	5.570.033	5.870.155
Útgjøld	-6.883.340	-4.468.510
Felags festipulja 31. desember	48.391.713	49.705.020

14 Kontur fyri mist bit

Salda 1. januar	12.598.020	12.053.363
Inngjøld	249.919	612.955
Útgjøld	-371.522	-68.298
Kontur fyri mist bit 31. desember	12.476.417	12.598.020

15 Onnur skuld (stuttfreistað)

Tjóðsavnið/MMR – antikvariska serskipan í Koltri	316.824	572.984
Búnaðarstovan – ábøtur á bygningar	236.394	7.619.982
Búnaðarstovan – rakstur	6.900.000	4.900.000
Onnur skuld	-19.000	41.211
	7.434.218	13.134.177

16 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.

17 Eventualognir

Grunnurin hevur við árslok 2024 eina møguliga skattaáogn á 4.100 tkr., sum í høvuðsheitum stavar frá skattligum halli frá undanfarnum árum.